LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Starvs- og persónsprofilur til aðalstjórastarvið í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Hesin starvs- og persónsprofilur fevnir um niðanfyri nevndu tættir:

1. Kunning
2. Setanartreytir
3. Uttanríkis- og vinnumálaráðið
4. Felags virðisgrundarlag
5. Persónsprofilur
6. Meting av umsøkjarunum
7. Tíðarætlan
8. Eftir setanina

## 1. Kunning

Undanfarni aðalstjórin seinastu árini fer nú úr starvi. Starvið verður nú lýst leyst.

## 2. Setanartreytir

Starvið er tænastumannastarv. Starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins (í løtuni kr. 54.339,50 um mánaðin). Harumframt er ein mánaðarlig viðbót uppá 5.094,75 kr. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Tilsamans er lønin kr. 59.434,17 um mánaðin umframt frítíðaríkoyti (1,5 %). Tey fyrstu 2 árini eru at rokna sum royndarár.

Setanarøkið fevnir um Uttanríkis- og vinnumálaráðið, stovnar undir ráðnum, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

## 3. Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er eitt av 8 stjórnarráðunum hjá landsstýrinum. Virksemið og ábyrgdirnar á ráðnum kunnu í høvuðsheitinum býtast í eitt uttanríkisøki og eitt vinnuøki.

Niðanfyri er frágreiðing um nakrar tættir í virkseminum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Til ber at lesa meiri á www.uvmr.fo, og nakrir stovnar og nevndir hava egna heimasíðu.

**Uttanríkisøkið:**

Uttanríkismál fevna um millumtjóðasamstarv, handilsmál, altjóða rætt, trygdar- og verjumál, alment diplomati og tjóðarbranding, menningarsamstarv o.a. Aðalstjórin hevur ábyrgdina mótvegis landsstýrismanninum og tryggjar, at uttanríkispolitisku málini vera røkt á fullgóðan hátt.

Uttanríkistænastan røkir og samskipar uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, og hevur um hendi samskifti og samráðingar við onnur lond. Sendistovur Føroya í Keypmannahavn, Brússel, London, Reykjavík og Moskva eru samrunnin partur av uttanríkistænastuni.

Umframt at virka fyri teimum uttanríkispolitisku málum, sum samgongan hevur sett sær fyri at fremja, tekur uttanríkistænastan sær av dagliga samskiftinum við útlendskar myndugleikar, og røkir føroysk áhugamál í millumtjóðafelagsskapum, sum Føroyar eru partur av, herímillum NEAFC, NAFO, NASCO, SPRFMO, FAO, IMO,NAMMCO, IWC UNESCO, norðurlendska samstarvinum. Arktiska Ráðnum, eins og røkt av verandi handils- og samstarvssáttmálum. Uttanríkistænastan veitir eisini øðrum stjórnarráðum ráð í altjóðarættarligum málum og protokollmálum.

**Vinnuøkið:**

Ráðið, við aðalstjóranum á odda skal fyrst og fremst, saman við landsstýrismanninum, tryggja karmarnar fyri føroyskt vinnulív soleiðis at føroyska vinnan er kappingarfør og skapar karmar við dagførdari lóggávu og javnari dagføring av vinnupolitikkinum.

Ráðið skipar karmarnar fyri føroyskari alivinnu við áhaldandi at dagføra lóggávu og kunngerðir og alivinnupolitkk. Alivinna er eitt ógvuliga týðandi øki, tí alivinnan hevur havt alsamt vaksandi týdning fyri føroyska búskapin. Avbjóðingin júst nú er at tryggja

sjúkustøðuna hjá alilaksinum, hetta verður m.a. gjørt við at hava eina góða og nútímans yvirvøku og við at áseta reglur fyri tal av lús pr. laks.

Í grannalondunum hevur ferðavinnan fingið ein alsamt vaksandi leiklut í búskapinum, og í fleiri av londunum er júst ferðavinnan ein av grundarsteinunum undir búskapinum og framhaldandi menning av samfelagnum. Tí er neyðugt at tryggja karmarnar fyri føroyskari ferðavinnu og saman við vinnuni hava eina dagførda strategi og tryggja nøktandi fígging til økið, og soleiðis skapa grundarlag fyri framhaldandi vøkstri.

Ráðið skapar karmar fyri føroyskari sjóvinnu við dagførdari lóggávu og implementering av altjóða sáttmálum til tess at tryggja, at føroysk sjóvinna og skráseting er kappingarfør.

Á málsøkjunum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum eru ymsir stovnar, partafeløg, nevndir og grunnar, harímillum:

- Sjóvinnustýrið
  - FAS
- Heilsufrøðiliga starvsstovan
- Jarðfeingi
- Vinnustovnurin
  - Fjarskiftiseftirlitið, Kappingarráðið, Skráseting Føroya, Posteftirlitið, Tryggingareftirlitið, Útlendingastovan
- Brúkaraumboðið
- Rúsdrekkasøla landsins
- Partafeløg
  - P/F Atlantic Airways, P/F Føroya Tele, P/F Posta, P/F Fiskaaling, P/F Visit Faroe Islands, P/F Føroya Lívstrygging (LÍV)
- Vinnuframaskipanir og grunnar
  - Vinnuframi (Vinnuframagrunnurin), Framtak (Framtaksgrunnurin) og Búagrunnurin

## 4. Felags virðisgrundarlag

Landsfyrisitingin, t.e. stjórnarráðini, virkar út frá hesum virðisgrundarlagi:

- Vit draga eina línu
- Vit seta skynsemi í hásæti
- Vit vilja vita
- Vit bróta slóð

Virðisgrundarlagið er m.a. lýst nærri á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni

Aðalstjórarnir og løgmansstjórin taka regluliga lut í teirra leiðsluforum, sum nevnist stjóraráðið. Stjóraráðið samskipar m.a. arbeiðið upp á tvørs í landsfyrisitingini.

## 5. Persónsprofilur

Góð leiðsla er ein avgerandi fyritreyt fyri, at fyrisitingin er nýskapandi og røkkur góðum úrslitum.

Aðalstjórin hevur tilvísing til landsstýrismannin. Høvuðsuppgávan hjá aðalstjóranum er at ráðgeva landsstýrismanninum og skapa úrslit við høgari fakligari góðsku í samstarvi við starvsfólkið. Aðalstjórin skal vera ein góður starvsfólkaleiðari, og skal vera fakliga dugnaligur innan breiða virkisøkið hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og skal vera heildar- og framtíðarsinnaður. Aðalstjórin skal ganga á odda og skal vera ein fyrimynd fyri starvsfólkini og starvsfelagarnar.

**Høvuðsuppgávan er at skapa úrslit við høgari fakligari dygd í samstarvi við tíni starvsfólk og starvsfelagar. Hetta krevur at:**

**Tú ert ein góður starvsfólkaleiðari:**

- Tú fremur arbeiðsgleði og motivatión hjá øllum starvsfólkunum, og tú skapar karmar fyri góðum arbeiðsviðurskiftum í eindini.
- Tú fært eindina at virka sum eitt toymi, har ið øll í verki fremja settu málini.
- Tú hevur innlit í evnini hjá hvørjum einstøkum starvsfólki, og tú leggur dent á at kanna og menna menningarmøguleikarnar hjá hinum einstaka.
- Tú boðar greitt frá, hvørji krøv verða sett til einstaka starvsfólkið, gevur starvsfólkinum rúmd at útinna verk sítt, og tú stuðlar og verjir tey.
- Tú ert nærverandi og raðfestir samrøðuna við starvsfólkið.
- Tú raðfestir og skapar eina javnvág millum uppgávur og tilfeingi í tínari eind, og við hesum skapar tú karmar, sum kunnu tryggja, at hvørt einstakt starvsfólk kann finna eina javnvág millum arbeiðið og privatlívið.
- Tú tekur ímóti og gevur erlig og uppbyggjandi skoðsmál.
- Tú tekur hond um trupulleikar og avbjóðingar, og tú torir at taka avgerðir, eisini tá tær eru ófjálgar.

**Tú ert fakliga dugnaligur innan virkisøkið hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum**

- Tú hevur góðan kunnleika til virkisøki og arbeiðshátt í einum stjórnarráði. Tú hevur politiskt tev og eina greiða fatan um, hvussu tú fremur uttanríkispolitikkin og vinnupolitikkin hjá landsstýrinum.
- Tú ert tænastuhugaður, og tú dugir at umgangast meiningarmyndarar, avgerðartakarar, viðskiftafólk og samstarvsfelagar.
- Tú dugir væl at lesa støður, lurta eftir ábendingum og at taka avgerðir út frá hesum.
- Tú samskiftir greitt og væl, og tú hevur virðing og kunnleika til aðrar mentanir.

**Tú dugir at síggja heildina og ert framtíðarsinnaður**

- Tú leggur dent á heildina og tekur støði í tí, sum tænir heildini best.
- Tú dugir at samstarva og at netverka, og tú fremur tvørgangandi samstarv. Serliga hevur tað týdning, at tú ert ein virkin leikari uppá tvørs av stjórnarráðunum, soleiðis at bestu loysnirnar kunnu verða framdar.
- Tú hevur visjónir, tú hugsar strategiskt, og tú setur mál í rætta høpi.

- Tú dugir at tillaga teg, tá ið umstøðurnar broytast, og tú setur æru í at vera fremstur í menningini.
- Tú vísir virðing og álit, tú sært ymisleika sum eina styrki, og tú dugir at fáa tað besta burturúr ymsu dygdunum hjá starvsfólkum, starvsfeløgum og samstarvspørtum.

## 6. Meting av umsøkjarunum

Ein setanarnevnd, sum er mannað við tveimum fólkum úr Løgmansskrivstovuni (løgmansstjórin og leiðarin fyri starvsfólka- og HR-økið), einum royndum aðalstjóra úr øðrum ráði og einum royndum starvsfólkaumboði úr Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, stendur fyri setanartilgongdini. Møguliga verður ein persónur við innliti í HR/útvegan av starvsfólkum knýttur at setanarnevndini. Setanarnevndin velur umsøkjarar til setanarsamrøðu. Setanarnevndin metir umsøkjararnar út frá fakligu, leiðsluligu og persónligu førleikunum, sum eru nevndir í lýsingini og í hesum starvs- og persónsprofili, í setanarpolitikki landsins (sí http://www.lms.fo ) og út frá, hvussu mett verður, at persónurin hóskar til Uttanríkis- og vinnumálaráðið og tess uppgávur ("organisational fit").

Tá ið setanarnevndin fremur sína innstilling, er tað út frá hesum grundarlagi:

- Tann skrivliga umsóknin
- Setanarsamrøðan
- Tilvísingarpersónar, sum umsøkjarin velur út millum sín leiðara, starvsfelagar og starvsfólk, ið setanarnevndin setir seg í samband við telefoniskt
- Møgulig test(s)
- Møguliga 2. setanarsamrøðu

Tilmælið verður latið løgmanni. Løgmaður setir síðani starvið í samráð við landsstýrismannin.

## 7. Tíðarætlan

Umsøkjarar eiga at upplýsa teldupostbústað, sum kvittan fyri móttøku av umsóknini verður send til. Gingið verður út frá, at hesin teldupostbústaður kann nýtast til framhaldandi samskifti í trúnaði millum umsøkjaran og Løgmansskrivstovuna/setanarnevndina í setanartilgongdini.

Vegleiðandi tíðarætlanin sær soleiðis út:

- Í viku 10 (7.-11. mars) verður støða tikin til, hvør verður kallað/-ur inn til setanarsamrøðu
- Í viku 11-12 (14.-23. mars ) fara setanarsamrøður fram. Gev gætur, at páskafrítíð kann ávirka tíðarætlanina.
- Í viku 13 og 14 (29. mars – 8. apríl) fara møguligar tests o.a. og samrøður við tílvísingarpersónar fram
- Í viku 15 (11.-15. apríl) fremur setanarnevndin sína innstilling
- Í viku 16 (18.-21. apríl) verður starvið ætlandi sett

## 8. Eftir setanina

Tann, sum fær starvið, fær bjóðað eina samrøðu, har umrøtt verður, hvussu tann setti kann fáa sparring o.a. fyri at koma væl í gongd í starvinum. Møguleiki er fyri at fáa ein starvsfelag, sum sparringspartnara.

Umleið 3 mánaðir eftir at nýggi aðalstjórin er farin til verka, hevur løgmansstjórin eina uppfylgjandi samrøða fyri at meta um, hvussu komið er í gongd.